Oktober



*Clinton lyfti hendan smádrongin upp í fangið, tá ið hann fór út at heilsa upp á fólk í Havn*

# Clinton hugtikin av flagtekjum

**Fyrrverandi amerikanski forsetin legði Føroyar fyri sínar føtur á síni stuttu vitjan í Føroyum. Clinton heilsaði upp á nógv fólk, helt fyrilestur, og tók flagtekjuna við sær sum gott hugskot ímóti veðurlagsbroytingum**

Útflutningur av flagtekjum. Hetta ljóðar sum ein vánalig skrøna, men føroysku flagtekjurnar hava hugtikið sjálvan Bill Clinton so mikið nógv, at hann ikki ivast í, at hesar kunnu brúkast til at fyribyrja útlát av vakstrarhúsgassum.

Bæði á Hotel Føroyar og í Norðurlandahúsinum hevði hann føroysku húsatekjunar á munni. Sjálvt um tær kanska ikki tilsamans eru so nógvar í tali, so mótvirka tær útláti, umframt at vera orkusparandi, tí tær bæði virka móti kulda og ov nógvum hita.

Bill Clinton heldur, at føroyska fyribrigdið, sum tó eisini finst aðrastaðni, í størri mun skuldi verið brúkt í strembanini at mótarbeiða veðurlagsbroytinga.

- Tá eg koyrdi úr lufthavnini og sá tykkara vøkur oyggjar, legði eg til merkis seyðirnar, sum eg minnist frá barndóminum, men sum her hjá tykkum eru fleirlittir. Eg legði eisini til merkis flagtekjurnar, og hugsaði um, at tit eru langt frammanfyri okkum amerikanarar á hesum økinum. Hugsa sær til hvussu stóra nyttu ein býur sum New York, sum vit sjálvi nú búgva í eftir forsetatíðina, kundi fingið burtur úr hesum, segði Bill Clinton.

## Mælti fólki til at vitja í Føroyum

Umframt at vera skaðiligt á umhvørvið, so hækkar prísurin á brennievni alsamt. Útlit eru fyri, at tunnuprísurin, ið liggur um 80 dollarar í løtuni, fer upp upp 100 dollarar, áðrenn long tíð er fráliðin, segði Bill Clinton á pallinum í Norðulandahúsinum.

Fyrrverandi amerikanski forsetin segði vera til reiðar at vera eitt slag av ambassadøri fyri Føroyar og mæla fólki til at vitja hendanvegin.

Líka sum Hans Blix heldur Bill Clinton, at veðurlagsbroytingar er ein tann størsta hóttanin móti heiminum. Hann nevndi eisini stóra vøksturin í fólkatalinum, sum eina stóra hóttan, um ikki meiri verður gjørt fyri at betra um livikor og mórarbeiða fátækradømi.

Útrokningar vísa, at um eini 40 ár fer fólktalið at vaksa úr 6,5 mia. upp í 9 mia., og tað eru valla nóg nógvir resursir til øll hesi fólkini. Sum dømi nevndi hann tilfeingið í sjónum, ið partvís er hótt av ovurfisking, men eisini orsakað av broytingum í veðurlagnum, ið ger, at nógv plankton verður útruddað.

> *- Eg meti ikki kroppin vera heilt kláran, og serliga hælsinan hevur argað og plágað meg. Tá ið eg ikki fái spælt 100%, so kann eg ikki spæla á landsliðnum, tí har krevst at ein er púra klárur til hvønn dyst.*
>
> *Óli Johannesen, liðformaður, gevst á landsliðnum*

> *- Ja, eg kann siga, at eg havi tikið seyðin fram um alt. Tað, sum hevur upptikið meg mest og hevur tikið ein hóp av tíð, orku og eisini hevur kostað pening gjøgnum mong, mong ár, eru royndirnar og eldhugurin at fáa reina glarfiti í hagan – og tálgafitina burtur.*
>
> *Petur Skeel Skarðá, røktingarmaður*

## Nýggj Rás 2

Miðlavarpið hevur keypt Rás 2, og fríggjadagin 5. oktober fer nýggja Rás 2 í luftina fyri fyrstu ferð úr Miðlahúsinum í Vágsbotni og Pegasus í Klaksvík. Rás 2 fer undir nýggja skrá mánadagin 8. oktober, og sent verður allar dagar í vikuni.

- Tað er áhugavert at sleppa at royna nakað nýtt og verða við til at byggja eina útvarpsstøð upp frá nýggjum, sigur Elin Winther Poulsen, ið saman við Jón Briani Hvidtfeldt hevur skift útvarpið hjá Kringvarpinum út við Rás 2.

## Føroyar fremstar

Ferðafólk um allan heim dáma best at ferðast til oyggjalond. Av tí sama eru summar oyggjar við at drukna í ferðafólki. National Geographic hevur biðið 522 altjóða serfrøðingar atkvøða, um hvørjar oyggjar framvegis eru áhugaverdar atvitja, og hvørjar eru yvirfyltar við ferðafólki. Í umhvørvishøpi liggja Føroyar fremst av 111 oyggjalondum

## NSÍ umsíður á toppinum

NSÍ vinnur sítt fyrsta føroyameistaraheiti í mansfótbólti. Kappingin er spennandi, men móti endanum er tað NSÍ, sum hevur munin á øllum hinum liðunum. Longu í næstseinasta umfari er FM-heitið tryggjað, og so kunnu teir gulu úr Runavík fara uttan nervar til Klaksvíkar, har seinasti dysturin verður spældur, at taka ímóti gullinum. Rómurin er ófórur, og í Runavík verður hildin ítróttarveitsla sum ongantíð áður.